

# Samkomublaðið fyri aug/sept

# 2015

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## *Hvussu brúka vit tíðina?*

**Eiler Royðutoft**

"Lítið til Harrans, meðan hann er at finna,
kallið á hann ta stund hann er nær." (Jesaja 55, 6)

Í dagligdegnum ræður um alla staðni at møta til tíðina. Skalt tú handils, ja so má tað vera, meðan handilin er opin. Tað sama er við einum kontóri; tú mást tú fara, meðan kontórtíðin er. Ella ætlar tú tær at gera eina vitjan á sjúkrahúsinum, ja so mást tú fara í vitjanartíðini.

Vit hava her fingið eina fyrireikingartíð, meðan vit liva og rørast her á jørð. Ein tíð, sum skal útnyttast til at gera okkum klár til at møta Guði, og standa til svars fyri, hvussu og hvat vit brúktu tíðina til.

Orðið sigur: Ger teg tilreiðar at møta Guði tínum!

Vit liva í eini náðitíð. Nátt kemur, tá ongin kann arbeiða, also er náði tá úti.

So hjálpi Guð tær at gera teg til kláran og íklæða teg Jesus Krist, sum er vegurin til Faðirin.

# Skrá fyri aug/sept

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 24. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 25. august | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 29. august | kl. 21.00: | AWAKE við Anniku Høj. Evni: At tæna menniskjum |
| Sunnudagur | 30 august | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 31. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 1. sept. | kl. 10.00: | Eingin bønardagur |
| Mikudagur | 2. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 5. sept. | kl. 21.00: | AWAKE við Deboru Biskopstø |
| Sunnudagur | 6. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen. Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum. Døgurði (tilmelding krevst) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 7. sept | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 8. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 9. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 12. sept. | kl. 21.00: | Einki AWAKE vegna ungdómsmøti í Filadelfia í Havn (Rise and Shine) |
| Sunnudagur | 13. sept. | kl. 11.00: | Sjónvarpsmøti |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 14. sept. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 15. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 16. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 19. sept. | kl. 21.00: | AWAKE við Paula Høj. Evni: Bøn |
| Sunnudagur | 20. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Øyvind Bjerkenes |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 21. sept | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 22. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 23. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 26. sept. | kl. 21.00: | AWAKE við Arnold Jakobsen. Evni: Vón í vónloysinum |
| Sunnudagur | 27. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku |

# Lýsingar

**Hjúnabandslegur í Kelduni**
11.-13. sept. og 23.-25. okt. verða hjúnabandslegur í Kelduni. Legan byrjar kl. 20 fríggjakvøld og er liðug kl. 11 sunnumorgun.
Pláss verður fyri 12 pørum á hvørjari legu. Kostnaður er fyri parið 700 kr. uttan uppreiðing og 800 kr. við uppreiðing.
Møguleiki verður at tilmelda seg á keldan.fo.

**Forbøn og/ella samtalu mikudagar:**
Góða samkoma! Vit hava í eina tíð tosað um at betra møguleikan hjá okkara samkomulimum fyri at fáa forbøn og/ella at fáa eina samtalu við okkum. Vit báðir, Pauli og Ólavur, vilja tí geva tær eitt serligt høvi til hetta mikudagar á skrivstovuni í Kelduni. Best er, um tíð verður avtalað áðrenn, so ikki alt ov mong koma í senn.
Til ber at ringja tila Paula Høj (232511) og Ólavur Jacobsen (218819).

**“Dávid, ein maður eftir Guds hjarta”**
Mikudagarnar 16/9 og 30/9 verður farið undir eina røð við bíbliuundirvísing í barnasalinum, har evnið verður “Dávid, ein maður eftir Guds hjarta.”
Vit fara at tosa um Dávid, hansara lív og tænastu, og hvat vit kunnu læra av honum sum trúgvandi í dag. Vit koma eitt nú at tosa um:

- Guds kall, útveljing og salving til tænastu.
- At varðveita hjartað.
- Hvussu ein kann fyrireika seg til at tæna Gudi, tá ið ein er ungur.
- Hvat gera vit tá ið vit snáva.
- At bíða eftir Gudi.
- At styrkja teg sjálva(n) við sangi og lovsangi.
- Hvussu ein kann sigra á “Goliat”, einum hóttandi risa.
- At fyrireika komandi ættarlið til ta uppgávu, ið liggur fyri framman.
- …umframt annað spennandi.

Lærari: Ólavur Jacobsen

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584